# Birgit og Niels Jákup heiðrað



*Nú heiðursprógv Poul E. Petersens varð latið á fyrsta sinnið, var ikki annað enn náttúrligt, at Birgit Hestoy gjørdist annar av móttakarunum*



*Hin móttakarin av heiðursbrævinum varð Niels Jákup Jacobsen, sum í nógv ár hevur verið ein av drívmegunum innan frælsa ítróttin í Føroyum*

**Á fyrsta sinni eru heiðursprógv Poul E. Petersen latin. ÍSF-forsetin handaði Birgit Heystoy og Niels Jákup Jakobsen prógvini leygardagin 29. desember 2001. Prógvini vórðu latin sum viðurkenning fyri ósjálvsøkið, framtakssamt og virkið arbeiði til frama fyri føroyska ítrótt og føroyskt samfelagslív.**

HEIÐURSPRÓGV
*Tíðindaskriv*

Poul E. Petersen varð borin í heim í Sørvági 29. august 1901.

Sum ungur fekk Poul tokka til ítrótt. Eftir lokið lærarskúlaprógv í 1923 varð hann settur sum lærari í Mykinesi og røkti hetta starv til 1941. Hesi árini sum lærari í Mykinesi nam hann sær dyggan lærdóm til ymsar tættir innan ítrótt — bæði á árssskeiðum á danska læraraháskúlanum og á ymsum ítróttaskeiðum uttanlanda.

Í 1938 varð Poul E. Petersen útnevndur ítróttaráðgevi, men røkti eisini lærarastarv fram til 1944, tá hann fór at virka sum ítróttaráðgevi burturav fram til 1954, tá starv hansara varð niðurlagt, av tí at skúlaumsjónin varð umskipað.

Poul E. Petersen varð sera virkin maður og árini hann starvaðist sum ítróttaráðgevi vakti hann ans fyri ítrótti yvirhøvur og eydnaðist honum eisini at fáa ítrótt inn um skúlagátt sum fasta lærugrein við flestu av landsins skúlum. Hann legði hesi ár eisini fleiri skrivlig rit um ítrótt úr hondum, eitt nú um svimjing, hond- og fótbólt og um fimleik og skúlaítrótt.

Árini hann var í Danmark fekk hann stóran ans fyri hvussu danska ítróttarørslan varð skipað og eitt tað fyrsta hann gjørdi, tá hann varð settur í starv sum ítróttaráðgevi, var at fáa í lag eina samskipan av føroyskum ítróttafeløgum, eitt ítróttasamband. Ítróttasamband Føroya varð sett á stovn 4. apríl 1939 og varð Poul E. Petersen kosin fyrsti formaður í ÍSF, og hetta starv røkti hann, til hann á aðalfundinum við árslok 1946 bar seg undan afturvali.

Poul Petersen var eisini blaðstjóri á Ítrótttatíðindum, blaðnum hjá ÍSF, frá 1. árgangi til nr. 7 í 7. árgangi 1947. Hann helt eisini skeið fyri lærarum, serliga í frælsari ítrótt og í svimjing. Hesi skeið vórðu hildin á sumri og vórðu nøkur teirra hildin í Mykinesi.

Tá ítróttaráðgevarastarvið varð niðurlagt í 1954 fór Poul E. Petersen í fyrsta umfari í starv sum lærara-vikar og ferðalærari, men frá 1. september 1956 fekk hann fast starv við Tórshavnar Kommunuskúla og røkti hetta starv til hann, eftir umsókn, fór frá við eftirløn í august 1971.

Tað var ikki bert innan ítrótt at Poul E. Petsren var virkin. Árini 1939-50 var hann næstformaður í Føroya Lærarafelag og varð hann í 1954 kosin til formann — eitt starv sum hann røkti til 1960. Umframt mong onnur álitisstørv var hann limur í Føroya Skúlastjórn 1968-75 og legði hann úr hondum fleiri bøkur, bæði uppruna lesibók og týðingar.

Poul E. Petersen andaðist 25. apríl 1977.

Poul E.Petersen hevði serligan tokka til svimjing og frælsa ítrótt, ið stóðu hjarta hansara næst. Men hann var altíð virkin fyri fjøldina og øllum ítróttagreinum og hevur hann havt ómetaliga stóran týdning fyri alla ta føroysku ítróttarørsluna.

Fyri at heiðra minni um ítróttaráðgevan Poul E. Petersen, ið legði lunnar undir Ítróttasambandið og fekk skipanina av ymsu ítróttagreinunum í rætt lag, hevur ÍSF gjørt av, at tað á hvørjum ári skulu handast tvey heiðursprógv, ið bera navnið hjá ítróttaráðgevanum — eitt til mann og eitt til kvinnu, sum hava gjørt vart við seg og tænt ítróttini á serstakan hátt.

Aftaná innstilling frá ymsu ítróttagreinunum avgjørdi stjórn ÍSF at heiðursprógvini fyri 2001 skuldu latast til Birgit Hestoy á Tvøroyri og Niels Jákup Jakobsen í Tórshavn.

Grundgevingarnar fyri at lata júst hesum báðum fyrstu heiðursprógv Poul E. Petersen vóru m.a. hesar:

**Birgit Hestoy, Tvøroyri:**
Birgit verður av nøkrum nevnd »the grand old lady« innan svimjing. Hetta heiti er ikki heft á hana tí at hon nú er komin til árs, men er meira meint sum ein heiður, ið lýsur at Birgit hevur verið virkin innan svimjing í nærum ein mansaldur.

Birgit hevur sjálv svomið heila sítt lív. Tá hon byrjaði at svimja var eingin svimjihylur á Tvøroyri so hon var ein teirra, ið svam á sjónum — og onkur man løtan eisini hava verið onkran góðveðursdag í Ósanum í Trongisvági.

Hóast Birgit alla tíðina hevur svomið tí at hetta er gott og sunt fyri likam og sál, so hevur hon heldur ongan tíð noktað fyri, at í allari ítrótt er eisini ein feril av kapping. Sjálv hevur hon svomið kapp á sjónum — líka frá tríatiárunum til hon seinastu ferð royndi seg á fjørðinum í 1969. Aftaná hetta var tað svimjihylurin, ið gjørdist staðið, ið Birgit royndi seg.

Birgit hevur alla sína tíð verið sera virkin innan svimjing. Hon hevur verið ein eldsál og ikki verið bangin fyri at gingið á odda tá brúk hevur verið fyri tí. Hon hevur verið virkin í Tvøroyrar Svimjifelag síðani byrjanina av sekstiárunum — bæði sum nevndarlimur og ikki minst sum venjari. Nógvar eru genturnar á Tvøroyri, ið hava notið gott av hennara arbeiði og eigur hon sín avgjørda lut í, at Tvøroyrar Svimjifelag í dag telist millum tey frægastu í landinum — serliga tá umræður gentur og yngri svimjarar.

Men tað er ikki bert innan svimjig at Birgit hevur gjørt vart við seg. Hon hevur á besta hátt prógvað at tað ber væl til at sameina ymsar tættir innan mentanarlívið. Hon er felagsmenniskja burtur av og í nógv ár var hon eisini aktiv innan bæði tónleik og sjónleik á Tvøroyri. Birgit hevur sett spor eftir seg. Styrkt og stuðla og við glaða lyndi sínum hjálpt øðrum tá bæði venjingar og kappingar hava kenst møtimiklar og tungar. Hon hevur verið allari svimjítróttini ein góð fyrimynd.

**Niels Jákup Jakobsen, Tórshavn:**
Niels Jákup Jakobsen kann sigast at vera ein av undangongufólkunum innan frælsa ítrótt í Føroyum í nýggjari tíð. Longu tíðliga í 1980-unum gjørdist Niels Jákup virkin innan frælsa ítrótt. Sum aktivur hevur hann serliga gjørt seg galdandi innan renning á longu teinunum, har hann hevur verið við í fremstu røð.

Hann hevur eisini skipað fyri kappingum innan frælsa ítrótt kring alt landið bæði undan og eftir, at Deildarsambandið fyri Súkkling og Frælsa Ítrótt varð stovnað. Seinnu árini er luttøkan til tær stóru rennikappingarnar Flaggdagin og á Ólavsøku vaksin uppum 200 luttakarar. Hann hevur í nógv ár verið formaður í elsta felagnum fyri frælsari ítrótt í Føroyum, Bragdinum.

Niels Jákup hevur umboðað Føroyar á øllum Oyggjaleikum frá 1987 til 2001. Inntil 1997 var hann við sum luttakari, og megnaði hann at vinna bronsumerki í liðkappingini í hálvmarathon 1997. Eftir hetta hevur hann verið fyriskipari og liðleiðari hjá føroyska landsliðinum í frælsari ítrótt. Hann hevur eisini roynt seg sum venjara hjá rennarum, ið hava vunnið heiðursmerki á Oyggjaleikum.

Treysti og trúfesti hava merkt virksemið hjá Niels Jákupi. Við sínum fjølbroytta og áhaldandi virksemi hevur hann stuðlað breiddini og styrkt elituni innan føroyska frælsa ítrótt.



## Útbjóðing

Vegna Fuglafjarðar kommunu verður betongarbeiðið viðv. brúgv um Skarðsá (við Lonina) boðin út í almennari útbjóðing.

Lisitatiónin verður í Býráðshúsinum í Fuglafirði tann 29. januar kl. 14.00, og kunnu teir í boðið hava verða hjástaddir.

Útbjóðingartilfar kann bíleggjast hjá Fuglafjarðar kommunu, tlf. 444006 móti veðhaldi kr. 2.500 kr., sum verður at gjalda inn á konto í Føroya Banka nr. 6460 2205965.

*Fuglafjørður 02/01-02*
**Fuglafjarðar býráð**
Tekniska deild

## Kunngerð

**um framløgu av broytingaruppskoti til byggisamtykt fyri Leirvíkar Kommunu.**

Við heimild í løgtinglóg nr. 13 frá 21. mai 1954, seinast broytt 13. mai 1997, verður við hesum boðað frá, at bygdarráðið á fundi 22. november 2001 hevur samtykt at gera broytingar í Byggisamtyktini og at hesar verða lagdar fram til almenna eftirskoðan á Kommunuskrivstovuni frá 04. januar 2002 til 18. januar 2002 báðir dagar íroknaðir.
Uppskotið umfatar at:

Broyta økið sum umfatar grótbrotið og nakað av økinum uttanum til ídnaðarøki, nevnt C4.

Møgulig mótmæli móti uppskotinum og broytingaruppskot skulu skrivliga vera bygdarráðnum í hendi í **seinasta lagi 04. apríl 2002.**

*Leirvík tann 02/01-2002*
**Leirvíkar Kommuna**
Postboks 42
520 Leirvík

## Aðalfundur

Aðalfundur Fótbóltssamband Føroya verður í Norðurlandahúsinum, Tórshavn, leygardagin 23. februar 2002 kl. 10.00.

Fundarskrá sambært lógunum.

Fótbóltssamband Føroya
The Faroe Islands' F.A.
Member of FIFA – UEFA – ÍSF

Við Sosialinum
Í BÝIN
hvønn hósdag !

AEROBIC
SPINNING
BALLETT

Byrjað verður aftur MÁNADAGIN 7. JANUAR
og halda vit á til MIKUDAGIN 27. MARS

**Yndi** *kann bjóða flest øllum okkurt slag av kropsvenjing. Kvinnum sum monnum, ungum sum eldri, stórum sum smáum, sterkum sum veikum.*
*Kom framvið og fá tær ein faldara ella eitt prát.*

**SPINNING er sera gott fyri ♥, lungu og blóðrenslið sum heild. Eisini er SPINNING sera konditiónsstimbrandi og samstundis ein ógvuliga góður háttur at klænka seg. Samstundis kann SPINNING íðkast av øllum, eisini teimum við veikum liðum ella ryggi.**

**Trim & spinn:** klænkandi og uppstrammandi, øll kunnu vera við
**Rygghold:** hevur tú trupulleikar við rygginum er hetta nakað fyri teg
**Aeroboxing:** nýtt, nýtt, nýtt
**Barna aerobic:** 13 ár og eldri

AEROBIC

| Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag |
|---|---|---|---|
| 17:15 - 18:30 Aerobic *Vand* *Tórhalla* | | 17:30 – 18:30 Low Kvinnur *Oddvør* | 18:00 – 19:00 Aerobic Byrjarir *Maud* |
| 18:30 - 19:30 Trimmari Øll *Oddvør* | 19:00 – 20:00 Aerobic Byrjarir *Kirstin* | 18:30 – 19:45 Stepp/Styrki *Joan* | 19:00 - 20:00 Trimmari *Maud* |
| 19:30 - 20:30 Aeroboxing *Kirstin* | 20:00 - 21:00 Cirkulvenjing *Kirstin* | | 20:00 - 21:00 Rygghold *Anna Maria* |

SPINNING

Størri høli, betri og fjølbroyttari venjing

| Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Leygardag |
|---|---|---|---|---|
| 17:00 – 18:00 Trimm&spinn Óluva | 17:00 – 18:00 Trimm&spinn Tórhalla | 17:00 – 18:00 Trimm&spinn Óluva | 17:00 – 18:00 Trimm&spinn Tórhalla | 15:00 - 16:15 Trimm&spinn Mix |
| 19:00 – 20:15 Trimm&spinn Ingrid | 20:00 – 21:00 Spinning Evald | 19:45 – 21:00 Trimm&spinn Joan | 19:00 – 20:00 Spinning Evald | |

KOSTNAÐUR FYRI ALT SKEIÐIÐ: SKÚLANÆMINGAR
1 tíma um vikuna: 450 kr. 20% avsláttur
2 tímar um vikuna: 710 kr. 20% avsláttur
3 tímar um vikuna: 910 kr.

BALLETT

Byrjað verður aftur mánadagin 8. januar og hildi verður fram til 7. mai

| Mánadag | Týsdag | Hósdag |
|---|---|---|
| 16:00 - 17:00 Aerobic børn 13 ár - *Maud* | 16:00 - 17:00 *9 - 11 ár* *Annika/Rebekka* | 16:00 - 17:00 *12 - 14 ár* *Eyð/Durita* |
| | *17:00 - 18:00* *6-8 ár* *Eyð/Durita* | 17:00 – 18:00 15 ár - *Kristina* |
| | *18:00 - 19:00* *15 ár -* *Kristina* | |

KOSTNAÐUR FYRI ALT SKEIÐIÐ
6-12 ár: 490,- kr.
13 ár og eldri: 590,- kr.

**Yndi** *leigar tímar til feløg, fyritøkur og onnur*

***Tilmelding á telefon 31 00 25 - 31 28 68 - 31 13 11 ella støkk inn á gólvið í Yndi, Yviri við Strond 21, leygardagin hin 5. januar frá 15:00 til 16:00***



YNDI
*v/ Elsu Mariu Bærentsen*
*www.yndi.fo*

Sosialurin - 311820

Yviri við Strond 21 tlf 311 311
FO-100 Tórshavn far. 213 213
e-mail: yndi@post.olivant.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Pedagogur

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir pedagogi til Býlingshúsið millum Gilja.

**Starvið**
Talan er um eitt starv í Reiðrinum , sum er ein vøggustova við 12 børnum í aldrinum 0-3 ár.

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur ein stóran leiklut í gerandisdegnum, og stutt er burtur í hagan og oman á Svartafoss.

**Vit ynskja**
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum.

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt og er førur fyri at taka avgerðir í arbeiði sínum.

**Setunarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Kirstin Djurhuus, leiðara, tlf 318372 ella Katrin Petersen samskipara, tlf 315160 .

**Umsókn.**
Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Býlingshúsinum millum Gilja, Boks 3165, 188 Hoyvík, í hendi í seinasta lagi 21. jan. 2002.

SNARSKIVAN

## Skeið í 1. hjálp

Fyrstahjálparskeið 12 tímar og/ella 16 tímar byrja 11. og 12. januar, um nóg nógv tekna seg. Hevur tú annað ynski, so sig frá.

Tú kanst tekna teg við at ringja tlf. 319630 ella við telduposti til: redcross@redcross.fo ella við at senda henda lepa inn áðrenn mikudagin 09.01.02 kl. 21.00.

Skeiðini verða hildin um vikuskifti í Havn, uttan so, at nóg nógv tekna seg aðrastaðni, so kann skipast hold uttan fyri Havnina.

Navn ______________________________

Bústaður ___________________________

Tlf. _______________________________

Ynski ______________________________